Sunnudagin 22. juli kl. 15,00:

Miðsummarkonsert frá Holmekollen

Kendi skíbakkin uttan fyri Oslo kann eisini nýtast til annað enn vetrarítrótt. Hvørt summar verður skipað fyri miðsummarkonsert á hesum stað. Í ár er tað klaverkonsertin hjá Edvard Grieg, sum er á skránni, við Evu Knardahl sum solisti. Eisini verður eitt brot úr ballet, við tónleiki eftir Harald Sæverud framført, eins og Leminkainen-tónleikur, eftir Jean Sibelius. Edith Thallhauge syngur norskar sangir og filharmoni-orkestrið í Oslo framførir við Mariss Janson, sum leiðara



Edith Thallaug, sangkvinna



Eva Knardahl, pianistur



Tony Ferraz og Kjertin Gudin



sjónvarp

Leygardagin 21. juli

19,30 **Børnini á Westmere 3** (3)
20,20 **Tað er leygarkvøld**
21,25 **Hill Street**
22,55 **Tað er leygarkvøld**
23,45 **Liðugt**

Sunnudagin 22. juli

15,00 **Miðsummarkonsert frá Holmekollen**
16,00 **Sangløta**
— — —
19,30 **Cookie fer á sjúkrahús**
19,55 **Cezanne**
20,35 **Otto Leisner**
21,15 **Samband ynskist** — en. SV-leikur
22,10 **Birgitte Grimstad syngur**
22,35 **Andakt**
22,40 **Liðugt**

Týsdagin 24. juli

19,30 **Radisurnar**
19,55 **Vísur og prát**
20,55 **Oili Mäki**
21,20 **Di dómari og kinesisku kleysturmorîni** — am. filmur
22,55 **Heimsins vánaligastu vertir**
23,25 **Liðugt**

Hósdagin 26. juli

20,00 **Ítróttur**

Fríggjadagin 27. juli

19,30 **Dawn**
20,00 **Finskir arkitektar**
20,50 **Flamenco**
21,20 **Hevnd**
22,35 **Wendel Adkins**
23,20 **Liðugt**

Leygardag 21. juli kl. 19.30
Børnini á Westmere 3(3)

Tónleikabólkurin skal framføra fyrstu ferðina, men tá fær Poul brádliga eitt bræv, sum upplýsir, at Tom, gamli vinur hansara er horvin. Frank, sum er fyristøðumaður á heiminum bjóðar sær til at hjálpa Poul at finna Tom.

Sunnudagin 22. juli kl. 21.15

Samband ynskist

Hetta er ein skemtiligur filmur. Betty er einkja í besta aldri, sum fær hugskotið í lýsing at finna sær mann gjøgnum bløðini.

Ein maður, nevndur Walter svarar ilýsingini, og hann er eftir øllum at døma ein rættur sheikur.

So hvørt sum frálíður, varnast Betty, at Walter er ein rættur konufólkajagstrari. Hann hevur nógvar vinkonur umframt Betty, sum hann avgjørt ikki hevur hug at sata frá sær... Tað er tó rættiliga áhugavert at hava konufólkini í hvør sínum heraðshorni... serliga um okkurt gott fæst til matna, og klæðini verða vaskað fyri ein...

Hetta vil Betty tó ikki lata um seg ganga.



DANICA — køkurin
P/f HELLA
Tórfinsgøta 41
Tlf. 16477 · Box 351
3800 Tórshavn

Sunnudagin 22. juli kl. 22,10:



Birgitte Grimstad syngur

Norska sangkvinnan Birgitte Grimstad, sum er ættað úr Danmark, hevur vitjað í Føroyum í 70unum.

Í kvøld sendir sjónvarpið brot úr konsert hennara, sum í fjør heyst var í konserthúsinum í Oslo.

Sjálv sigur Birgitte Grimstad, at hennara framførslur eru afturskoðandi framsýningar av myndandi list, har hon hevur valt at tulka ymisk verk hjá yrkjarum.

— Hetta er eisini ætlað sum tjakevni í orðaskiftinum, — sæð frá sjónarmiðnum hjá einum mentanararbeiðara, sigur Birgitte Grimsted.

Á tónlistasíðuni er konsertin ein roynd at bróta niður múrar millum ymsu tónlistagreinirnar. Vit hoyra klassiskan tónleik, vísusang, rocktónleik, jazztónleik og nýggjari tónlistagreinir.

Sunnudagin 22. juli kl. 19.30
Cookie fer á sjúkrahúsið

Hetta er barnasending um eina gentu, sum eitur Cookie. Hon er so ómetaliga góð við dukku sína, men vinkonur hennara vilja ikki lata dukkuna gerast limur í loyniliga dukkufelagsskapi teirra. Ikki fyrr enn Cookie gerst sjúk, verða vinkonurnar greiðar yvir, hvussu góð hon er við dukku sína.

HONDA
lak&rust
garanti
·findes ikke bedre

LYDEX
ÚTSTOYT
til flestu bilar
á goymslu



LYDEX
Minst líka gott
sum originalt
Andreas M. Andreasen
Bøgøta 16, tlf. 13816

Kiropraktorstovan
Bókbindaragøta 6
Tórshavn
og
Heilsumiðstøðin
Miðvági
Anna Maria S.
Jørgensen
Kiropraktor
Tlf. 1 7510